# Føroyskar fyritøkur onga serstøðu

OLJA

Jústinus Leivsson Eidesgaard



*KJ-Hydraulik:*
*Ólavur Asafsson Olsen,*
*Birgir Samuelsen,*
*Arnstein Prestá*
***Normek:***
*Tórfinn Hansen,*
*Robert Langgaard*
***El-Service:***
*Magni S. Simonsen,*
*Tummas Johannesen,*
*Magnus Hansen,*
*John Eli Olsen*
***PAM Offshore Service:***
*Dánjal Pauli Mohr,*
*Poul Anker Mortensen*
***Atlantic Supply Base:***
*Lassi Borðoy*
***Agip Faroe Branch:***
*Ólavur Gregersen,*
*Ingi Højgaard*

**Aberdeen, Sosialurin:** Tað hoyrist javnan, at føroyskar fyritøkur sleppa ov lítið upp í part í oljuvinnuni og tað dryppar ov lítið av til føroyska vinnulívið. Men framtíðin fer at vísa, at vit sleppa ikki nakað sum helst, bara tí vit eru føroyingar. Føroysk virkir sleppa upp í part, um tey lúka treytirnar oljuídnaðurin setir sínum undirveitarum og bara tí. Allar fyritøkur sum arbeiða innan oljuvinnu skulu lagast til oljuvinnuna og ikki umvent. Hetta er samandrátturin av tí fimm føroyskar fyritøkur fingu burturúr eini vitjan í Aberdeen í hesi vikuni. Oljufelagið Agip, sum stendur fyri næstu boringini undir Føroyum var vertur fyri føroyingunum.

At sleppa upp í part at fáa arbeiði í oljuvinnuni er ikki lætt. Skulu føroyskar fyritøkur gera sær nakrar tankar um at fáa lut í oljuíðnaðinum, eitt nú í Bretlandi, so liggur hart arbeiði fyri framman, at gera seg dugnaligari, at laga seg til og at lúka krøv.

Í Bretlandi fær ein fyritøka neyvan nakað arbeiði frá einum oljufelag, um felagið ikki er skrásett í eini telduskrá, sum nevnist F-Pal. Hendan telduskráin er fimm ára gomul og yvir 2000 virkir eru knýtt at henni. Fyri at kunna standa á hesi telduskrá, so er neyðugt, at virkið lýkur tey strangastu krøvini oljufeløgini stilla til undirveitararnar.

– Summir oljufelag seta onnur krøv, umframt tey, sum skulu lúkast fyri at fáa plássí F-Pal og hjá okkum er fyrsta kravið trygdin til eitt virkið, sum skal gera eina uppgávu fyri okkum. Vit hyggja eftir trygdarkrøvunum og um arbeiðsskaðar eru hendir á fyritøkuni í seinastuni. Tá vit velja eina fyritøku til eina uppgávu, so er umframt trygdarkrøvini, prísviðurskiftini og dygdin av arbeiðinum avgerandi avgerandi, sigur Ian Miller frá Agip.

At eitt felag ger sítt arbeiði til lítar hevur nógv at siga fyri oljufeløgini.

– Vit hava ofta lyndi at fara aftur til somu veitararnar, gera teir eitt gott arbeiði. Hetta er rættuliga menniskjasligt. Tað er oljufelagið, sum í seinasta enda hevur ábyrgdina fyri øllum, og tí hevur tað ovurstóran týdning, at arbeiði verður gjørt innan karmarnar av okkara kørvum, sigur Ian Miller frá Agip.

Í føroyaska ferðalagnum vóru fýra fyritøkur úr Eysturoynni., KJ-Hydraulik úr Fuglafirði, El-Service av Skála, Normek úr Norðagøtu og Atlantic Supply Base úr Runavík. PAM Offshore Service úr Havn var eisini við á ferðini.

Mikudagin var ferðalagið og vitjaði umborð á framleiðslupallinum Tiffany, sum liggur nakað eystanfyri Hetland. Farið var við tyrlu og føroysku fyritøkurnar sóu her við egnum eygum, hvørjar uppgávur liggja fyri framman og hvat skal til fyri at føroyingar kunnu luttaka í oljuvinnu. Í Aberdeen hittu føroysku fyritøkurnar umboð fyri møguligar komandi samstarvsfelagar í Bretlandi. Onkrar av fyritøkunum høvdu verið í samband við hesar fyritøkur fyrr og eisini vórðu nýggj sambond vóru knýtt. Ferðalagið kom heim aftur hóskvøldið við Atlantic Airways og nú sodnar tað, sum kom burtur úr. Føroyskar fyritøkur hava allar møguleikar at luttaka sum undirveitarar til oljuvinnuna í Bretlandi, tær skulu bara verða eins dugnaligar og kappingarneytarnir. Oljan undir Føroyum gevur okkun ongar sersømdir úti í heimi.



*Ian Miller, Agip*


# Pakkaferðir summarið 2002

*2 vaksin & 2 børn í bili



Ferðist bíliga ...

Danmark



Danland* íbúðir
1 vika í frítíðaríbúð
31.05. og 07.06.
úr 5.995,-



Dan Center* summarhús
1 vika í summarhúsi
31.05. og 07.06.
úr 6.716,-

Noreg



Pers Hotel* í Gol
1 vika í summarhúsi
27.05., 03.06. og 10.06.
úr 5.898,-

Hetland



Easterhoull* Chalets
1 vika í summarhúsi
27.05., 03.06. og 10.06.
úr 6.394,-

Pakkaferð - Ísland



Key Hotellini
við 7 daga innivist
á hotelli
í dupultkamari
úr 5.814,-
fyri hvønn

Sigl & Flúgv



Siglt verður annan vegin
og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm
og Keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
úr 2.550,-
fyri hvønn

SMYRIL LINE
www.smyril-line.fo
Tel 34 59 00
e-mail: booking@smyril-line.fo
team85



# Vikuskifti í Danmark

Prísur fyri hvønn
Føroyar-Keypmannahavn aftur og fram
1.815,-
Føroyar-Billund aftur og fram
1.853,-
(Ferðaavgjøld eru íroknað prísin)

Tað eru serligar reglur galdandi fyri hesar prísir. Tvey fólk skulu ferðast saman og ferðaseðlarnir skulu keypast 7 dagar áðrenn fráferð. Ferðaseðlarnir kunnu keypast til 9. juni 2002, og seinasti heimferðardagur er 17. juni 2002. Talið á hesum ferðaseðlum er avmarkað.

Set teg í samband við eina ferðaskrivstovu ella far inn á www.maersk-air.dk

MAERSK AIR
It's got to be perfect





# Bilmekanikari

Vegna vaksandi virksemi á verkstaðnum, verður søkt eftir bilmekanikara, at byrja beinanvegin.

Bilfriðkan við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - Fartlf. 217300
www.bilfridkan.fo · bilfridkan@bilfridkan.fo




# Føroyar eru altavgerandi fyri Hirshals

**– Seks prosent av íbúgvunum í Hirshals eru føroyingar, og føroyskt vinnulív hevur risastóran týdning fyri býin, sigur borgarstjórin í Hirshalts, Knud Størup**

VITJAN

Heri á Rógvi



*Knud Størup, borgarstjóri í Hirtshals, hevur seinastu vikuna verið á vitjan í Føroyum, har hann hevur kunnað um býin og vitjað nógv virki og kommunur*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Seinastu vikuna hevur borgarstjórin í Hirtshals verið á vitjan í Føroyum. At Føroyar og serstakliga føroyskt vinnulív hava sera stóran týdning fyri Hirtshals er eingin ivi um. Nógv føroysk skip hava millum ár og dag landað í Hirtshals, og Føroyar og føroyingar hava altíð sett sín serliga dám á býin, ið liggur heilt norðarliga í Jútlandi á vestursíðuni.

Borgarstjórin nevnir sum dømi, at millum fimm og seks prosent av íbúgvunum eru føroyingar.

Størsta einstaka arbeiðsplássið í Hirtshals er eitt virki hjá Vestlax, har eini 450 fólk eru í arbeiði, og hetta munar nógv í einum býi við vanliga stóra arbeiðsloysi, sigur Knud Størup.

Eisini hevur Skipafelagið nógv virksemi í Hirtshals.

Í Hirtshals búgva umleið 14.500 fólk, og býurin er sostatt ikki størri enn Havnin. Teirra havn er tó nakað størri enn Tórshavnar havn.

## Nýggj havn

Orsøkin til, at borgarstjórin og hansara fylgi eru í Føroyum, er fyrst og fremst at kunna um møguleikarnar, ið eru í Hirtshals.

– Hirtshals hevur í nógv ár verið tætt knýtt at Føroyum. Tað er sjálvandi fiskivinnan, sum er fremsta orsøkin til hetta. Vit hava verið fleiri ferðir í Føroyum áður. Orsøkin til, at vit eru komin aftur, er, at vit nú hava yvirtikið Hirtshals Havn frá landinum (2001, blðm.), og vit vilja fegin upplýsa um, hvørjir møguleikar eru í Hirtshals, sigur Knud Størup.

Fimm fólk eru í ferðalagnum, sum umboða bæði kommunalumyndugleikarnar og vinnulívið í býnum.

Á vitjanina skula tey vitja á heili fimtan støðum, har tað serliga eru fyritøkur innanfyri fiskivinnuna og aðrar kommunur, ið teir hava vitjað. Eitt nú er vinarbýarsamstarv millum Hirtshals og Runavík, og borgarstjórin, Knud Størup, hevði eisini góð orð at bera vinarbýi sínum fyri arbeiðið at skapa karmar fyri vinnulívi í sambandi við havnina í Runavík.

Í tilfarinum, ið føroyskar fyritøkur fáa frá teimum útsendu úr Hirtshals, er slagorðið: Hirtshals Færøernes dør til til Evropa. Hetta heldur borgarstjórin vera serliga spennandi sæð í ljósinum av, at Føroyar skulu festa røtur innanfyri ES.

– Vit kunnu nú bjóða ógvuliga góðar umstøður í Hirtshals. Vit eru í holt við at dýpa havnina til níggju metrar, og vit hava gott samband við motorvegin, soleiðis at tað er lætt og gott at sleppa til og frá Hirtshals, sigur Knud Størup.

Serliga sambandi við motorvegin eru Knud Størup errin um, og hetta heldur kann fáa stóra ávirkan. Ikki minst fyri føroyskt vinnulív.

Spyrt tú Knud Størup, so er eingin ivi um, at Føroyar og føroyskt vinnulív hava sera stóran týdning fyri Hirtshals.

– Føroyar og føroyskt vinnulív hava alstóran týdning fyri Hirtshals, og vit eru sera glað fyri samstarvið, sum vit vónar heldur fram í langa tíð afturat, sigur altso Knud Størup.

# Standmyndin av Kjølbro avdúkað

**Sunnudagin verður standmyndin av J.F. Kjølbro avdúkað á Biskupstøð í Klaksvík**

HÁTÍÐARHALD

Heri á Rógvi



*Hendan standmyndin hjá Hans Paula Olsen verður avdúkað í Klaksvík sunnudagin. Hetta er tó bert eitt lítíð modell av sjálvari standmyndini.*

Sunnudagin verður hátíðarhald á Biskupsstøð í Klaksvík. Tað er í sambandi við, at ein standmynd av kenda vinnulívsmanninum í Klaksvík, J.F. Kjølbro, verður avdúkað henda dagin.

Henda standmyndin er tann fyrsta av sínum slag í Klaksvík.

– Inniliga vón okkara er, at henda standmynd verður eitt heiðurligt minnismerki um henda framúrskarandi vinnulívs- og framburðsmann, og at hátíðardagurin, tann 26. mai 2002 fer eydnast til fulnar, skrivar Klaksvíkar býráð í tíðindaskrivi.

Hátíðarhaldið verður kl. 16 sunnudagin á Biskupstøð, á økinum uttanfyri Bókasavnið, har standmyndin skal standa.

Tað er Hans Pauli Olsen, listamaður, sum hevur gjørt standmyndina. Tað er í sambandi við 80 ára føðingardagin hjá Norðoya Sparikassa, at býráðið fekk tillutað standmyndina.

## Skrá fyri bygdarstevnuna á Skála 2002

Skála Ítróttarfelag

Fríggjadagin, 24. mai

| | |
|---|---|
| Kl. 18.00 - 20.00 | Barnadiskotek í Losjuni fyri 3 - 6 flokk |
| Kl. 19.00 | Sjavskapping í Pensjonistahúsinum |
| Kl. 21.00 | Ungdómsmøti í Meinigheitshúsinum - Kafé |

Leygardagin, 25. mai

| | |
|---|---|
| Kl. 10.30 | Fótbóltur, piltar: Skála - B36 |
| Kl. 11.30 | Fótbóltur, dreingir: Skála - VB |
| Kl. 13.00 | Fótbóltur, gentur 14-17: Skála - VB |
| Kl. 14.30 | Asbjørn Mikkelsen, formaður í mentanarnevnd Skála Kommunu setir stevnuna á vøllinum |
| Kl. 15.00 | Fótbóltur, 1. deild: Skála - VB |
| Kl. 16.00 | Tiltøk í Ítróttarhøllini: Tivoli við bamsutombola, bl.tombola, 21-spæli fiskidammi, hoppiborg og hamarslag |
| Kl. 17.00 | Emmas Blues Band spælir í Ítróttarhøllini |
| Kl. 17.00 | Fótbóltur, 4. deild: Skála b - KÍ a |
| Kl. 17.00 | Tíðarmyndir - framsýning við gomlum myndum í skúlanum Eisini verður ymist handaligt arbeiði sýnt fram, eisini vera gomlu motorarnir hjá Olivari Rasmussen at síggja |
| Kl. 17.00 | Petur Martin Rasmussen heldur fyrilestur um bygdirnar Skála og Skálafjørður um ár 1911 |
| Kl. 18.00 | Vørutombola í Ítróttarhøllini |
| Kl. 19.30 – 22.30 | Diskotek í Losjuni fyri børn frá 7 flokki og uppeftir |
| Kl. 19.30 | Manskórið hjá Jóhan Mortensen syngur |
| Kl. 20.00 | Felagssangur við manskórinum |
| Kl. 23.30 | Dansur í Ítróttarhøllini. D.J. show v/Martini Kjærbæk, James Olsen og dansigentunum |
| Kl. 23.30 | Gamlamannadansur í Bygdasalinum í Ítróttarhøllini Juliannuboys spælir |

Sunnudagin, 26. mai

| | |
|---|---|
| Kl. 11.00 | Gudstænasta í Skála kirkju. Jógvan Fríðriksson, prestur prædikar |
| Kl. 13.00 | Fótbóltur, 2. deild kvinnur: Skála – NSÍ |
| Kl. 15.00 | Kappróður |
| Kl. 15.00 | Tivoli letur upp á havnaøkinum |
| Kl. 17.00 | Tíðarmyndir - framsýning við gomlum myndum í skúlanum Eisini verður ymist handaligt arbeiði sýnt fram, eisini vera gomlu motorarnir hjá Olivari Rasmussen at síggja |
| Kl. 17.00 | Petur Martin Rasmussen heldur fyrilestur um bygdirnar Skála og Skálafjørður um ár 1911 |
| Kl. 17.00 | Ellisakfør sýnir fram gomul akfør á skúlaplássinum. Millum klokkan 17.30 og 18.00 verður vakrasta ellisakfarið funnið |
| Kl. 17.00 | Skemtidysur millum Skála Skipasmiðju og Tórshavnar Skipasmiðju |
| Kl. 18.00 | Stevnubingo |
| Kl. 18.00 | Møti í Nerija |
| Kl. 19.00 | Brotssparkskapping |
| Kl. 20.30 | Útimøti við Kelduni í Sparikassatúninum |